# á Tjóðpallinum



*Bárður Persson sum Barónurin og Súsanna Tórgarð í mannliga leiklutinum sum Satin*
*Mynd Jens Kr. Vang*



*Luka leiktur av Biritu Mohr við liðina av doyggjandi Annu, ið Ria Tórgarð spælir*
*Mynd Jens Kr. Vang*

## Tour de force

Leikurin hjá Gorki hevur 17 leiklutir. Í hesi uppsetingini eru teir skornir niður í 15, ið verða spældir av 7 sjónleikarum. Og hjá Biritu Mohr, Riu, Hans og Súsonnu Tórgarð, ið hava 2 og 3 leiklutir í part er talan um sanna tour de force. Tey megna við einføldum, men sannførandi miðlum at skifta ímillum sera ymiskar persónar – ikki minst sita teir mannligu leiklutirnir hjá Biritu, Riu og Súsonnu sera væl, eins og Hans Tórgarð er framúrskarandi í skiftinum millum tann niðurundirkomna Sjónleikaran, ið hann spælir sum ein kventil og eitt vrak, og tann sjálvsikra tjóvin Pepel, ið er tann persónurin í leikinum, sum kemur nærmast at hava eitthvørt tak á tilveru síni. Bárður Persson hevur valt at gera leiklutirnar sum verturin Kostylev og tann falleraði barónurin sera teatralskar, men megnar kortini alla tíðina at halda seg millimetrar røttumegin markið fyri tað yvirspældað og yvirdrivna. Hjálmar Dam megnar sera sannførandi at lýsa nýansurnar í harðrenda lásasmiðinum Klestjs. Barbara Christophersen spælir skøkjan Nastja – eg saknaði, at tann erotiska síðan av Nastju kom meira til sjóndar, tí tað vildi givið hennara romantisku stremban munandi størri dýpd, men í teimum løtunum, tá Nastjusa innastu dreymar og sárbæri koma til sjóndar, sæst at her er ein sjónleikari, sum hevur eitt veruligt talent at byggja víðari á.

## Hugtakandi pallmynd og búnar

Pallmyndina hava Dávid Geyti og Símun Pauli Hansen gjørt. Hon er spennandi og hugtakandi í sínum naturalistiska stíli. Tað er ikki ofta vit síggja steinsett tún og múraðar veggir á palli. Saman við búnunum hjá Katrin Bonde skapar hon ein góðan og stuðlandi søgukarm kring hendingarnar. Einasti veikleikin við pallmyndini er, at markið millum innandura og uttandura er so knívsskorðið. Tað er eins og spælið í fyrsta parti, sum bara fer fram innandura, kenst eitt sindur samankroyst. Ikki fyrr enn vit í øðrum parti flyta okkum uttandura, er tað eins og pallmyndin veruliga letur seg upp.

## Ein krevjandi klassikari

Umsetingin leggur seg tætt at talumálinum. Hon er sum heild í lagi, men tað fellur ikki í smakkin hjá hesum ummælaranum, at talumál í so stóran skal merkja danismur. Í onkrum førum tykjast valdu orðingarnar heldur at vera órógvandi anakronismur enn at gera tekstin livandi. Sum t. d. tá Bubnov, biður Nastju taka upp aftur søgu sína við orðunum "om igen".
Tað er djarvt av Tjóðpallinum at satsa upp á ein so krevjandi klassikara, sum Nátterherbergið eftir Maxim Gorki er. Men satsið eydnast og her býðst føroyska áskoðaranum eitt høvi at uppliva eitt meginverk í dramatisku heimsbókmentunum í eini livandi og viðkomandi føroyskari útgávu.



*Hans Tórgarð er framúrskarandi í leiklutinum sum tann niðurundirkomni sjónleikarin, ið hann spælir sum ein kventil og eitt vrak*
*Mynd Jens Kr. Vang*

## FAKTA

**NÁTTARHERBERGIÐ** *eftir: Maxim Gorkij*

| | |
|---|---|
| **Leikstjórn:** | Kristina S. Hansen |
| **Týtt:** | Ria Tórgarð |
| **Pallmynd:** | David Geyti og Símun |
| Pauli Hansen | |
| **Búnar:** | Katrin Bonde |
| **Leikarar:** | |
| *KOSTYLEV, vertur og eigari á herberginum* | Bárður Persson |
| *VASILISA, kona hansara* | Ria Tórgarð |
| *NATASJA, systir hennara* | Súsanna Tórgarð |
| *ABRAM (Medvjedev) farbróðir, politistur* | Ria Tórgarð |
| *PEPEL (Vassjka) tjóvur* | Hans Tórgarð |
| *KLESTSJ, lásasmiðjur* | Hjálmar Dam |
| *ANNA, kona hansara* | Ria Tórgarð |
| *NASTJA, ein genta* | Barbara Christophersen |
| *KVASJNJA, selur matvørur á torginum* | Birita Mohr |
| *BUBNOV, kasjett makari* | Hans Tórgarð |
| *SATIN* | Súsanna Tórgarð |
| *EIN SJÒNLEIKARI* | Hans Tórgarð |
| *EIN BARÒNUR* | Bárður Persson |
| *LUKA, pílagrímur* | Birita Mohr |
| *POLITIOVASTI* | Hjálmar Dam |
| **Ljóssetan:** | Árni Baldvinsson |
| **Arr. Tónleik:** | Kim Hansen og Jón McBirnie |
| **Upptøkur & ljóðmynd:** | Jón McBirnie |
| **Harmonika, klaver, gittari, keyboard:** | Kim Hansen |
| **Violin:** | Jákup Lützen |
| **Hár & smyrsl:** | Marjun Olsen |
| **Foto:** | Martin Sirkovsky |
| **Leikskrá og plakatuppsetan:** | Niels Arge Galan og Uni Árting |
| **Dramaturgisk viðgerð:** | Ria Tórgarð og Kristina |
| S. Hansen | |
| **Seyming:** | Katrin Bonde og Helen Jacobsen |
| **Ljósfólk:** | Símun Pauli Hansen |
| **Pallgerð:** | Símun Pauli Hansen, |
| David Geyti, Hjálmar Dam, | Reimar Nap. Djurhuus, |
| Janus í Dímun | |
| **Rekvisittir:** | David Geyti, Símun Pauli Hansen og leikararnir |
| **Teskari:** | Katarina Nolsøe |
| **Vegleiðing:** | André Niclassen |
| **Týtt sanginar:** | Alexandur Kristiansen |
| og Georg L. Samuelsen | |

*1. sýning á Meiarínum 28. februar 2007*
*Leikárið 2006 - 2007 7. leikverk*

**Tøkk til:**
*Tórshavnar Býráð, Lauru Joensen, Kunningarstovuna, Gurið Poulsen, Jórun Simonsen, Havnar Sjónleikarfelag, Fótbúni, Balslev, Smyril-Line, Kristian Blak, Per Danielsen, Valdemar Lützens Timburhandil, Rasmus Eysturoy, Poul Johan Dahl, Karl Aage Hansen, Unn Kragesteen*